# Hvussu læri eg at síggja harðskap og hvussu handfari eg mál um harðskap í parlagi og nærsambondum?

*Arbeiðir tú á almannaøkinum ella aðrastaðni innan sosiala, familju- ella heilsufakliga øki? Ella við arbeiðsmarknaða-, integratión, brek- ella eldraøkinum? Ert tú lækni, heilsufrøðingur, lærari ella námsfrøðingur? Ella kemur tú í tínum starvi, í samband við borgarar, sum antin eru harðskapsraktir ella sum fremja harðskap?*

**Eitt menniskja, sum antin er harðskapsrakt ella fremur harðskap, fer mest sannlíkt ikki at byrja eina samrøðu við at tosa um harðskap!**

Tí er tað av týdningi, at tú sum fakfólk hevur **eina grundleggjandi vitan um harðskap í parlagi og nærsambondum** og at tú vísir uppmerksemi í sambandi við tekin um harðskapin, hetta fyri at kunna **fanga harðskapin**.

Fært tú illgruna til ella beinleiðis vitan um, at ein borgari livir í harðskapi ella fremur harðskap, tá **eigur tú at hava eina samrøðu við viðkomandi**. Soleiðis fært tú eina greiða ábending um, hvør støðan er. Og tú fært møguleikan at hjálpa til at greiða tørvin og siga frá, hvussu til ber at søkja sær hjálp.

Verður tín illgruni um harðskap staðfestur, og er borgarin klárur til at taka ímóti hjálp, tá er tað av týdningi, at **tú kennir tína skyldu og hvussu tú kann fara víðari við málinum.** Tú fært møguleikan fyri **at reagera og vísa viðkomandi til røttu hjálpina.**

**Figur 1: Tre trin til opsporing og håndtering af partnervold**




**Hvordan opsporer og håndterer jeg sager om partnervold?** En håndbog til kommunale sagsbehandlere - Håndbog / April 2021- Lev uden vold

**Figur 1: Tre trin til opsporing og håndtering af børn, der oplever vold i hjemmet**




Hvordan opdager jeg, at et barn oplever vold i hjemmet, og hvordan kan jeg hjælpe barnet? En håndbog til lærere og pædagoger i skoler og fritidsordninger - Håndbog / April 2022 - Lev uden vold